# Bretlandi

*Toppar í føroyskum vinnulívi verða kunnaðir um framtíðar møguleikarnar at selja føroyskt gass í Stórabretlandi*





*Gareth Allinson, leitistjóri hjá Statoil sær stórar møguleikar báðumegin føroysk-bretska markið*




*Høvdingar hittast. Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri saman við føroyska Statoilstjórnum Rúna M Hansen uttan fyri høvuðsskrivstovuna hjá Statoil í London*

smærru gassfundini, sum eru gjørd mongu seinastu árini í økinum, sum tí bráddliga gerast lønandi hóast smá, tí har er komin ein gassleiðing at binda í.

Norðmenn hava rættiliga gjørt seg út til at ganga avbjóðingunum á bretska marknaðinum á møti og eru teir í løtuni v ið at menna tvey stór gassfelt við Bretlandi fyri eygað. Tað eina er í írskum øki og hitt er stóra Ormen Lange feltið, sum skal framleiða gass til Bretlands um nøkur ár. – Verður gass funnið við Føroyar, so vilja vit fegnir eisini fáa tað gassið á bretska marknaðin sigur Erik Kjos-Hansen. Annars gera norðmenn seg eisini út til at fara undir framleiðslu av gassi til Spania og USA. Talan er um risagassprojektið Snøvit í Norðurnorra. Fyri Statoil hevur tað nógv at siga at hava atgongd til fleiri gassfelt, sum kunnu veita gass til bretska marknaðinum.

Hóast gass gerast alsamt meira áhugavert, so heldur Erik Knos-Hansen, at oljan framvegis fer at hava størstan áhuga, men tað verður ikki antin ella, heldur verður tað bæði tvey. Prísurin á bæði olju og gassi er góður, hinvegin er oljan lættari at handfara enn gass. T.d. er ikki loyvt at brenna gass av í norskum øki. Tað setir fleiri krøv.

### Sær lovandi út

Eisini Garreth Allison, leiktistjóri hevði nøkur lovandi orð at siga føroyskum gestunum. Hann vísti á, at Statoil varð bjartskygt viðvíkjandi Føroyum.

– Enn eru bert fýra brunnar boraðir við Føroyar. Bretskumegin markið er talan um fleiri enn 200 brunnar, so vit mugu ikki útiloka nakað. Statoil fer saman við eitt nú Chevron at bora einar 2 til 3 avmarkingar brunnar næsta ár á Rosebankfundinum stutt frá markinum og hóast hetta ikki er í føroyskum øki, so fer tann vitanin at hava stóran týdning fyri leitingina á føroyska landgrunninum, her m.a. í Súluloyvinum, sum Statoil fekk tillutað í 2. útbjóðing.

Eisini fer Statoil at bora ein brunn í sínum 9 ára loyvi á føroyska landgrunninum í sokallaða Brugduloyvinum, har stórar vónir eru til Kappaprospektið undir basaltinum. Her er mest sannlíkt at finna olju. So alt bendir á eina positiva framtíð segði Gareth Allinson. Spurdur um møguleikarnar at gera fund av líknandi slag í Brugduloyvinum sum tað, ið gjørt var við Rosebank svaraði Allison, at hóast her eru 70 kilometrar millum hesi loyvini, tykist nógv benda á, at Kappaprospektið er av sama slag sum Rosebankfundið.

Hann nevndi so eisini ein brunn, sum Statoil fer at vera við til at bora seinni í ár, á Benbecula prospektinum, ið liggur í einum heilt øðrum øki, nevniliga millum Írland og Føroyar. Her gjørt eitt stórt fund, og nú skal so ein avmarkingarbrunnur gera av, um tað er lønandi og nóg stórt til at kunnu fíggja eina gassleiðing til Skotlands. Tað er Shell, sum er fyristøðufelag og skilst, at sera stórar vónir eru til hetta fundið. Gareth Allinson metti, at fór komandi boring at geva eitt gott úrslit, so fer hon eisini at lata upp dyr til leiting í øllum Rockalløkinum og tá kunnu økini sunnan fyri Føroyar bráddliga eisini gerast meira áhugaverd.